## Lærarastarv í Kvívíkar skúla (endurlýsing)

Tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 í Kvívíkar skúla.

Starvið verður sett frá 1. august.

**Søkt verður eftir:**

- Einum lærara til avlopstímar og tímar til serligan tørv/ped. stuðulstímar.

Starvið er umleið 14 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Tann, ið settur verður, skal:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiðinum
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- Vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær part av teimum musisku lærugreinunum**

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og helst royndir viðvíkjandi næmingum við serligum tørvi. Tó kunnu fólk við royndum og/ella áhuga fyri ped. mennandi arbeiði eisini søkja.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið / Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi **22. juli kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á fartlf. 211504.

*Kvívíkar skúli verður ein 3 flokkaður skúli við undirvísing í 1. – 7. árgangi. Komandi skúlaár verða 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er út og umbygdur og er sostatt ein nútímans skúli við sera góðum umstøðum, bæði fyri lærarar og næmingar. Lærararnir hava allir egna farteldu frá skúlanum.*

INPACT

## SUMMARFRÍ

Vit fara í summarfrí tann 14. juli og byrja aftur tann 4. august. Skrivstovan verður stongd í hesum tíðarskeiði.

P/F Grannskoðaravirkið INPACT
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn
telefon: 31 47 00; telefax: 31 38 15
heimasíða: www.inpact.fo
t-postur: inpact@post.olivant.fo

**Member of international network of professional accountants**

Runavíkar kommuna

### Námsfrøðingur til Dagstovnin í Skálafirði

Á dagstovninum í Skálafirði eru 2 vøggustovur við 12 børnum í hvørjari. Vit eru stovnur undir Runavíkar Kommunu og halda til í leigaðum hølum í Kelduni í Skálafirði. Umstøðurnar á stovninum eru góðar, hølini eru rúmlig og ljós og vit liggja tætt við haga og fjøru.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum, at geva tí møguleika at mennast bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum, er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**
Námsfrøðingi, 35 t. um vikuna til Reyðu Stovu. Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin. Ein týðandi partur av arbeiðinum verður at stuðla einum 2 ára gomlum barni í gerandisdegnum.

Setan verður frá 11. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Lis Sørensen, leiðara, á tlf 442252 ella 212252.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **mikudagin 23. juli 2008, kl. 12.00**

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

## SUMMARFRÍ

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 14. juli.

Opið verður aftur 4. august.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

## Starvslýsing

**PhD-verkætlan um góðskuoptimering av fiski og fiskavørum við betri hagreiðing umborð.**

Á granskingarkjarnanum fyri framleiðslutøkni er eitt starv í samband við eina PhD-verkætlan leyst at søkja. Arbeiðsstaður er Fiskirannsóknarstovan. Verkætlanin fer fram í tøttum samstarvi við føroyska fiskivinnu.

Endamálið við PhD-verkætlanini er at skjalprógva góðskuna av fiskinum hjá serliga partrolarunum, við objektivt at máta góðskuna av veiðuni. Hetta skal gerast við at:

- Kannað hvussu hagreiðingin av ráðvøruni umborð ávirkar góðskuna.
- Samanbera optimalt hagreiddan fisk við vanliga hagreiddan fisk.
- Spora hvørja ávirkan hagreiðingin umborð hevur á møguligt vøruúrval, sum fiskurin kann nýtast til.
- Meta um fíggjarligar avleiðingar fyri fiskiflota og framleiðarar, at fiskurin ikki verður optimalt hagreiddur.
- Útgreina møguleikarnar fyri, at bøta um góðskuna av rávøruni, meðan útreiðslurnar samstundis verða hildnar lægri enn økta virði.

PhD-verkætlanin fer fram her á landi eins og á útlendskum universiteti við serkunnleika í góðsku av fiski.

Umsøkjarar skulu hava prógv í viðkomandi fakøki frá universiteti. Tey, ið eru ávegis við at gera kandidatuppgávu, eru eisini vælkomin at søkja.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Meiri fæst av vita um verkætlanina við at venda sær til granskingarleiðaran, Helgi Nolsøe, á teldupostadressuni: helgino@frs.fo ella á 353949.

Umsóknarfreistin er 15. august 2008. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum o. ø. skulu sendast til:

**Granskingarkjarnin fyri framleiðslutøkni,**
Att.: Helgi Nolsøe
C/o Fiskirannsóknarstovan
Nóatún 1
FO 110 Tórshavn
Føroyar

## Bakarí til sølu

Bakarí Kringlan í Vági er til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 213806**